# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 29.01.2024 kl. 17.00

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Janus Thomsen |
| | Ronni Hammer |
| | Niels Olaf Eyvindsson |
| | Thorstein Thomsen |
| | Martin í Nesi |
| | Eir J. Norðberg |
| | Poul Laust Christiansen |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

1. **102-3-2024: Hvalbiar skúli – kostnaðarmeting endurbjálving av lofti v.m.**

Meting timburarbeiði áðrenn endurbjálving -

| | |
|---|---|
| endurbjálving av lofti og umvæling av ventilatiónsskipan: | kr. 1.082.000,00 u/MVG |
| El-arbeiði: | kr. 232.600,00 u/MVG |
| Samlaður kostnaður: | kr. 1.314.600,00 u/MVG |

**Trivnaðarnevndin 25.01.2024:**
Nevndin mælir til at seta arbeiðið í gongd, so fyrireikingar v.m. kunnu byrja.
**Fíggjarnevndin 29.01.2024:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at seta arbeiðið í gongd og fáa Byggitrygd Sp/f at gera arbeiðið, treytað av, at hetta verður gjørt í summarfrítíðini.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

Thorstein Thomsen luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 2.

2. **102-1-2024: Umsókn um loyvi til taðing – matr. 538, 132a, 171c, 87d og 87n, Hvalba.**

Søkt verður um leypandi loyvi til taðing við biotøðum frá Førka.
**Tekniska nevnd 23.01.2024:**
Nevndin mælir til at geva loyvi til taðing við avgassaðum biotøðum til allar matriklarnar og geva undantaksloyvi til matr. nr. 171c og 87d, tí hesir liggja nærri enn 50 m frá bústøðum. Nevndin metir ikki hetta vera ein trupulleika, tí tøðini eru avgassað og mongdin, ið nýtt verður er so lítil.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at geva leypandi loyvi til taðing sambært umsókn og taðingarætlan fyri matr. 538, 132a og 87d, treytað av, at kunngerð um taðing verður hildin. Loyvi verður ikki givið til taðing á matr. nr. 171c og 87d, ið liggja nærri enn 50 m frá bústøðum.

3. **<u>102-52-2023: Breiðkan av vegnum í Garðsenni.</u>**

Nú arbeiðið við at umvæla vegin í Garðsenni verður gjørt, er kostnaðarmeting gjørd av at breiðka vegin. Meirkostnaðurin av at breiðka vegin til 6,5 m. er mettur til kr. 610.600,00.

**Vega- og havnanevndin 24.01.2024:**

Nevndin mælir til, at arbeiðið verður gjørt skjótast gjørligt og má verða liðugt, áðrenn núverandi arbeiði verður liðugt.

**Fíggjarnevndin 29.01.2024:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at beina málið aftur í Vega- og havnanevndina fyri at fáa avtaluseðil við Sp/f E-Grevstur, undirskrivtir á marknaumskipan og avtalur millum kommununa og eigarar uppá pláss áðrenn. Alt hetta er treytað av, at peningur verður funnin innan verandi játtan til løgur 2024.

**<u>Avgerð</u>:**

Samtykt varð við 6 atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

4. **<u>102-98-2023: Skriv frá BHS viðv. parkering við eldrasambýlið</u>.**

Skriv frá Bú- og Heimatænastuni um átekning av P-básum vestanfyri sambýlið. Somuleiðis er ynski um fleiri P-pláss til stovnin, uppskot um P-básar niðanfyri heimið er hjálagt skrivinum.

**Tekniska nevnd 13.06.2023:**

Nevndin mælir til at ganga umsóknini viðvíkjandi P-básum vestanfyri sambýlið á møti og at hetta verður gjørt skjótast gjørligt.

**Trivnaðarnevndin 25.01.2024:**

Nevndin er samd um at fáa merkt básarnar upp á vestaru síðu og at arbeiðsformaðurin stendur fyri hesum. Somuleiðis mælir nevndin til, at kannað verður, hvat skal til fyri at gera P-øki á eystaru síðu.

**<u>Avgerð</u>:**

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum og fáa átekning av P-básum vestanfyri bygningin gjørdar.

5. **<u>Ikki alment mál</u>.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.15

Janus Thomsen Ronni Hammer Niels Olaf Eyvindsson Martin í Nesi

Thorstein Thomsen Eir J. Norðberg Poul Laust Christiansen